## Vikubløð stóran týdning

Tað er sera ymiskt, hvat fólk halda um tey litføgru donsku vikubløðini, men nú sigur rithøvundurin Jacob Ludvigsen, at vikubløðini hava havt líka stóran týdning fyri danska kunnleikastøðið sum háskúlarnir. Jakob Ludvigsen sigur, at vikubløðini høvdu sína bestu tíð frá miðskeiðis í 1930-unum til 1970-árini. Eitt er, at bløðini vóru kunnandi, men tey eisini høvdu stóran týdning, tí tað vóru mong, sum lærdu at lesa við at kaga í tey.



## Samstarv við turkar

Turkar hava ikki altíð verið høgt í metum í Íslandi, men tíðirnar broytast, og nú er turkiski ídnaðarráðharrin, Mehmet Hilmi Güler, í Íslandi og tosar við íslendska starvsbróður sín, Össur Skarphéðinsson, um samstarv landanna millum. Turkar hava serliga áhuga í at brúka jarðhita og vatnorku til elframleiðslu. Eitt nú er ætlanin at tvífalda vatnorkuna, og tvey íslendsk feløg hjálpa teimum við slíkum verkætlanum.

*Íslendingar og turkar tingast um orkusamstarv*

*Mynd: Vísir*

# Grøn orka - men ikki svørt sár

**- Vit halda tað vera skeivt, at atlit ikki verða tikin fyri áum, sum renna oman gjøgnum bygd øki – og áum, sum geva landslagnum lit og spæl. Í dag liggja hesar sum ljót og opin sár og misprýða, segði Elsa Annika Olsen, tá hon handaði Bjørt Samuelsen tær 645 undirskriftirnar í gjár**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sundalagsfólk hava savnað undirskriftir, tí tey meta ikki, at framferðarhátturin hjá SEV í sambandi við vatnorkuútbyggingar er rættur, sum tey taka til.

- Vit halda, at vit saktans kunnu útvinna orku úr varandi orkukeldum, men vit halda eisini, at hetta er eitt sera viðkvæmt evnið. Soleiðis, sum SEV arbeiðir í sambandi við sínar vatnorkuútbyggingar, merkir grøn orka – í okkara verð - svørt sár í landslagið. Her hugsa vit um allar tær upp-turkaðu áirnar í landslagnum í Norðureysturoy.

Tað var Elsa Annika Olsen, sum vegna fólk í Sundalagnum handaði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu í vinnumálum, tær 645 undirskriftirnar í túninum í Tinganesi um 14-tíðina í gjár.

Saman við henni vóru nakrar kvinnur, sum eisini búgva á Norðskálaleiðini, við í Tinganesi hendan góðveðursdag.

- Eftir okkara tykki er tað ikki rætt, at allar áirnar verða tiknar í einum so stórum øki, tí hesi virðir kunnu ikki gerast upp í peningi.

Tá Elsa Annika handaði Bjørt Samuelsen undirskriftirnar, vísti hon á, at tá friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til hesar útbyggingar, kann tað bert merkja, at málini onga veruliga viðgerð hava fingið – men bert eru avgreidd.



*Elsa Annika Olsen, stigtakari, handar Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu í vinnumálum, tær 645 undirskriftirnar ímóti, at SEV turrleggur áir í sambandi við sínar vatnorkuútbyggingar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Svørt opin sár

Hon vísti eisini á, at umhvørviskanningar eru gjørdar av djóra-og plantulívi, men ongar kanningar eru gjørdar av, hvørji árin hesar útbyggingar hava á tey menniskju, sum búgva á hesum leiðum.

- Vit halda tað vera skeivt, at atlit ikki verða tikin fyri áum, sum renna omangjøgnum bygd øki – og áum, sum geva landslagnum lit og spæl. Í dag liggja hesar sum ljót opin sár og misprýða.

Elsa Annika vísti á, at tað er ikki long tíð, síðan Føroyar lógu á einum fyrstaplássi fyri minst spiltu náttúruøki innan oyggjabólkar í heiminum.

- Hetta átti at stuðlað undir ta gongd, at vit fara væl um okkara náttúru og vísa henni størsta ans, tá útbyggingar verða framdar.

Hon endurtók, at tey, sum nú hava savnað inn undirskriftir, als ikki eru ímóti grønari orku úr varandi orkukeldum.

- Men neyðugt er at gera upp við hendan "alt ella einki" hugburðin, sum er galdandi, og neyðugt er at finna ein millumveg, tá slíkar útbyggingar verða framdar, sum ganga útyvir okkara náttúru.

### At vísa hógv

Tá Elsa Annika Olsen handaði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu, undirskriftirnar, nýtti hon samstundis høvi at heita á myndugleikar og elfelagið SEV um at vísa hógv – og vísa náttúruni ans.

- Vit vóna, at tú sum landsstýriskvinna fer at taka málið upp við SEV, segði stigtakarin til innsavnanina, Elsa Annika Olsen, at enda.

# Bjørt kundi eingi lyfti geva

**- Eg fari at ráðføra meg við Fjarskiftiseftirlitið, sum umsitir elveitingarlógina og kanna eftir um útbyggingarnar, sum nú eru farnar í gongd, eru í tráð við nýggju lógina á økinum, segði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna**

MÓTMÆLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá Bjørt Samuelsen hevði tikið ímóti teimum 645 undirskriftunum, sum fólk við Norðskála hava savnað móti vatnorkuútbyggingunum hjá SEV, segði hon, at hon als ongar trupulleikar hevur at fylgja teimum kenslum, sum tey føla, ið hava tikið stig til og hava skrivað undir mótmælisskrivið.

- Tá tú sært at ein á, har tú býrt, verður turrløgd, er tað sjálvsagt ógvuliga sárbart.

Samstundis, sum hon ásannaði, at tað sjálvandi ger fólki ilt, tá farið verður eftir økjum, har tey búgva, kundi hon ikki geva nakað lyfti um, at vent verður aftur við teirri útbygging av vatnorkuni, sum SEV nú er í holt við.

### Avgerðin tikin

- Eg noyðist at viðurkenna, at hetta er ein avgerð, sum er tikin fyri rættiliga langari tíð síðan, har ovasti myndugleikin hevur givið loyvi, og harkommunali myndugleikin eisini hevur verið við til at givið hetta loyvi. Tí er tað rættiliga trupult at koma aftur um aftur so langa tíð eftir, at øll hesi loyvi eru givin, segði hon.

Hon ásannaði soleiðis, at SEV hevur fingið øll neyðug loyvi, og avtalur eru gjørdar við arbeiðstakarar.

- Vit fingu eina nýggja elveitingarlóg í fjør, og sambært hesi eru krøvini herd í sambandi við umhvørvisatlit, sum skulu takast, tá útbyggingar verða framdar.

Bjørt vísti á, at tá ið tosað verður um umhvørvi, er talan um djóra-og plantulív og umhvørvið annars.

- Eg fari at ráðføra meg við Fjarskiftiseftirlitið, sum umsitir elveitingarlógina og kanna eftir um útbyggingarnar, sum nú eru farnar í gongd, eru í tráð við nýggju lógina, segði Bjørt Samuelsen, sum ikki kundi geva sundalagsfólki nakað lyfti í túninum í Tinganesi í gjár, tá hesi handaðu landsstýriskvinnuni undirskriftirnar.

*- Vit fingu eina nýggja elveitingarlóg í fjør, og sambært hesi eru krøvini herd í sambandi við umhvørvisatlit, sum skulu takast, tá útbyggingar verða framdar, segði Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

